1. september 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 7/2005

Tíð: Hósdagin 1. september 2005, kl. 13.00-14.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 6/2005 setursráðsfundi 30. juni 2005.** Góðkend við ískoyti.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Sjálvevaluering/dygdarmenning.** (J.nr. 0017-01639). Uppafturtøka frá seinasta fundi. Eftir at hava kjakast um endamálið og hvussu arbeiðið kann skipast, varð samtykt, at setursráðslimirnir í felag gera eitt uppskot til upplegg, sum verður sent megindeildunum til støðutakan. Tá deildirnar hava viðgjørt málið, verður støða tikin til, hvussu arbeiðið verður skipað.

4. **Fyrispurningur og tilboð um samstarv millum Københavns Universitet, Ilisimatusarfik og Fróðskaparsetrið um professarastarv í løgfrøði.** (J.nr. 0012-01661). *Fundarskal: Fyrispurningur dagfestur 12.7.2005, 2 s.* Setursráðið helt tilboðið verða áhugavert og er sera positivt fyri samstarvi. Ráðið metti tó ikki, at hetta er rætta tíðin til eina slíka avtalu. Vit eru enn á byrjanarstøði og mugu fyrst hava fólk við kunnleika til serføroysk viðurskifti. Rektarin svarar fyrispurninginum.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Innskriving av langtíðarlesandi.** (J.nr. 0040-01660). Setursskrivarin reist málið um studentar, sum skriva seg inn á hvørjum ári, uttan at vera lestrarvirkin. Útbúgvingarkunngerðin ásetir, at studentar innskrivaðir eftir gomlu skipanini, skulu vera lidnir at lesa í seinasta lagi 31. august 2006. Samtykt at SSS ger kunningarskriv til studentarnar, sum talan er um. Studentarnir skulu fáa bjóðað vegleiðing til at gera seinasta partin av lestrinum lidnan.

6. **Reins-hús. Nýtslurættur og ábyrgd fyri húsinum.** (J.nr. 0031-00405). *Fundarskjal: Teldubrœv frá EW, dagfest 10.8.200, 1 s.* Av tí at vit ikki longur hava undirvísingarhølir í Sjómansskúlanum, fer Søgu- og Samfelagsdeildin at brúka miðhæddina í Reins húsi til undirvísing í heyst. Tvey rúm á loftinum vera framhaldandi arbeiðsrúm hjá studentum. Triðja rúmið hevur Føroyamálsdeildin nýtslurættin til eins og higartil.

7. **Lestrarársbyrjan.** (J.nr. 0040-01678). Samtykt ikki at hava nakað felags tiltak í ár. SSS skal umvegis deildirnar kunna studentarnar um relevant tilfar um lestur á setrinum, sum liggur á heimasíðu okkara.

8. **Tilboð um orðabókahald frá Sprotanum.** (J.nr. 0037-01679). *Fundarskjal: Brœv frá Sprotanum, dagfest 13.7.2005, 1 s.* Áhugi var ikki fyri at tekna felags hald til allar brúkarar á Setrinum. SSS svarar Sprotanum.

9. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 5.7.05.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Føroyamálsdeildin 30.8.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

10. **Mentamálaráðið hevur gjørt av at seta arbeiðsbólk, sum skal greina hølistrupulleikarnar hjá Fróðskaparsetrinum, við einum umboði fyri Fróðskaparsetrið, einum fyri Landsverk og einum fyri Mentamálaráðið. Rektarin hevur valt Anniku Sølvará í bólkin. At staðfesta.** (J.nr. 0039-01020). Staðfest.

11. **Í sambandi við automatiska innskriving til próvtøkur á Náttúruvísindadeildini hevur deildin gjørt hesa orðing til innskrivingarskjalið:** ***Váttan um innskriving til útbúgving ella stakgreinir og til próvtøkur í øllum lærugreinum, ið innskrivingin fevnir um".*** **At staðfesta.** Staðfest.

**Kunningarmál:**

12. **Mánaðarjavni juli 2005, nýtsla fyri alt setrið 10.400.100 kr = 54,5% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).

13. **Bókavørðurin, Herluf Hansen, hevur fingið farloyvi til víðariútbúgving fyribils í 1 ár. Unn Patursson er sett í avloysarastarv, væntandi frá 1. oktober 2005.** (J.nr. 0021-01662, 0023-00149 og 0023-01677).

14. **Frágreiðing frá Kellie Holler frá ferðini í Føroyum í summar, hon var á summarskeiði og fekk námsferðarstuðul.** (J.nr. 0071-01392).

15. **Ráðstevna í París 22.-23.9.05 "Child and Adolescent Mental Health in Educational Settings", France University of Naples, Italy.** (J.nr. 0057-00155).

16. **Útgávur:**
    a. **Landsroknskapur fyri fíggjarárið 2004, Fíggjarmálaráðið.**
    b. **Frá Norðurlendska Ráðharraráðnum: Kundval för äldre och funktionshindrade i Norden, Konsumentperspektivet, TemaNord 2005:507 – Innvandringens velferdspolitiske konsekvenser, Nordisk Kunnskapsstatus, ANP 2005:506 – Äldreomsorgsforskning i Norden, En kunskapsöversikt, TemaNord 2005:508.**
    c. **Medicinalberetning for Færøerne 2005, ársfrágreiðing landslæknans.**

Frágreiðing: Annika Sølvará